# Viðmerkingar til “Undersøgelse af investeringsafkast”

***Tryggingareftirlitið hevur kunngjørt danska kanning, dagfest 5. desembur, nevnd “Undersøgelse af investeringsafkast”, har hugt verður eftir íløguvinninginum hjá føroyskum pensjónsgrunnum í tíðarskeiðinum 2013-2017.***

***Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags (EFA) kann fegnast um, at sambært kanningini, hevur íløguvinningurin hjá júst EFA verið bestur í nevnda tíðarskeiði.***

Avbjóðingin við slíkari kanning er, at ein hópur av sera fløktum viðurskiftum liggja handan viðurskiftini í kanningini. Eitt nú er trupult at sammeta pensjónsgrunnar t.d. kann stórur munur verða á aldrinum á kundaskaranum í grunnunum. Hetta vil føra við sær, at grunnarnir ikki hava og ikki skulu hava somu samanseting av íløgunum og váðin er tí heldur ikki sammetiligur.

Einhvør samanseting av íløgum skal og má hóska til skaran av uppspararum, hvørs uppsparing er tengd av íløguni. Og fyri tað fyrsta skal samansetingin verða gjørd sambært lógum og reglum. Eins týdningarmikið er, at samansetingin hóskar til uppspararan. Her verður eitt nú hugsað um váðafýsni og aldur.

Pensjónsgrunnarnir nýta í dag sokallaða marknaðarrentu, til renting av uppsparingini. Hetta merkir, at kundin eigur váðan - tá tað gongur væl, fær kundin allan vinningin og tá tað gongu illa, fær kundin hallið.

Í langa tíðarbilinum hevur einstakt ár við halli tó minni týdning. Vert er kortini at nevna, at royndirnar hjá kundunum hevur stóra ávirkan á, hvør váði er hóskandi at taka, vegna kundan.

Føroyskir kundar hava, í øllum førum í miðal, stuttar royndir við slíkum íløgum, tí kann sigst, at váðin eigur at verða lægri í Føroyum.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at kanningin júst vísir, at danskir pensjónsgrunnar hava tikið størri váða enn teir føroysku. Hetta merkir, at teir donsku í miðal hava ligið við fleiri partabrøvum ein teir føroysku.

Júst tíðarskeiðið, ið kanningin fevnir um, hevur verið sera góð fyri partabrøv. Sostatt eru eitt nú árini 2001, 2008 og 2011, ið vóru ring partabrævaár ikki fevnd av kanningini.

Tá kanningin síðani tekur munin á íløguvinninginum í Danmark og Føroyum, nevnda 5-ára tíðarskeið, og roknar munin út á eitt 40 ára uppsparingartíðarskeið, verður gingið út frá, at vit í samfull 40 ár fara at hava áhaldandi góða partabrævagongd. Ikki er trupult at meta um sannlíkindið fyri hesum.

Eftirlønargrunnur FA’s